# Hósdagur 14. november

## SVF

17.30 Viftan
18.00 Toktummas 27
18.05 Risin sum seyg tummil
18.15 Tummilstummas
18.25 Smásøga
18.30 Atlantis High 10
19.00 Eitt dýpi av dýrari tíð 1:2 e
20.00 Dagur og Vika
20.25 Grannar okkara
20.50 Gesturin
21.15 Læknin hevur orðið
21.45 Krimitímin: Eitt mál fyri Frost 1:2 — bretsk krimi
23.00 Borð um borð e
00.00 Liðugt

## Eurosport

07:30 Sailing: Sailing World
08:00 Tennis (Live): Tennis Masters Cup Shanghai China
09:30 Rally Raid: World Cup Uae Desert Challenge
10:00 Golf: Challenge Tour Season Review
10:30 Sailing: Sailing World
11:00 Tennis (Live): Tennis Masters Cup Shanghai China
14:00 Football: Uefa Cup
15:45 Tennis: Tennis Masters Cup Shanghai China
16:45 News: Eurosportnews Flash
17:00 Tennis: Tennis Masters Cup Shanghai China
18:30 Tennis: Tennis Masters Cup Shanghai China
19:30 Sailing: Louis Vuitton Cup New Zealand Auckland
20:30 Boxing: International Contest
22:00 News: Eurosportnews Report
22:15 Football: Uefa Cup
23:45 Rally: World Championship Great Britain Cardiff
00:15 News: Eurosportnews Report

## BBC Prime

0.00 TLZ: »Frank Lloyd Wright«
1.50 TLZ: »Poppea«
2.30 TLZ: »Lesley Garrett Tonight«
3.00 TLZ: »Computing for the Terrified – Hands Off«
3.30 TLZ: »Branded – Levis: Blue Dreams«
4.10 TLZ: »Renaissance Secrets«
4.40 TLZ: »Driving While Black«
5.10 TLZ: »Greek Language and People – Like's and Dislikes«
5.35 Look Ahead
6.00 Smarteenies
6.15 The Shiny Show
6.35 William's Wish Wellingtons
6.40 Maid Marian & Her Merry Men: »The Nice Sumatran«
7.05 50/50
7.30 Ready Steady Cook
8.15 House Invaders
8.45 Going for a Song
9.15 The Antiques Show
9.45 Changing Rooms: »Machynlleth, Wales«
10.15 Vets in the Wild
10.45 Lovejoy: »Breaking the Broker«
11.45 The Weakest Link
12.30 Passport to the Sun
13.00 Eastenders
13.30 House Invaders
14.00 Going for a Song
14.30 Smarteenies
14.45 The Shiny Show
15.05 William's Wish Wellingtons
15.10 Maid Marian & Her Merry Men: »The Nice Sumatran«
15.35 50/50
16.00 Barking Mad
16.30 Ready Steady Cook
17.15 The Weakest Link
18.00 Antiques Roadshow: »Tenby«
18.30 Ground Force: »Jersey«
19.00 Eastenders
19.30 Friends Like These
20.30 Chambers: »The Bequest«
21.00 Blackadder II: »Money«
21.30 Harry Enfield and Chums
22.00 Attachments: »Dotbomb«
23.00 Cardiac Arrest: »Factor«
23.30 Cardiac Arrest: »The Critical Hour«

## BBC World

00:00 BBC News
00:30 HARDtalk (r)
01:00 BBC News
01:30 Fast Track (r)
01:45 Holiday (r)
02:00 BBC News
02:30 Europe Direct (r)
03:00 BBC News
03:30 Asia Today (r)
03:45 World Business Report (r)
04:00 BBC News
04:30 HARDtalk
05:00 BBC News
05:30 World Business Report
06:00 BBC News
06:30 World Business Report
07:00 BBC News
07:30 World Business Report
07:45 Sport Today
08:00 BBC News
08:30 Fast Track (r)
08:45 Holiday (r)
09:00 BBC News
09:30 Europe Direct (r)
10:00 BBC News
10:30 Asia Today
10:45 World Business Report
11:00 BBC News
11:30 HARDtalk (r)
12:00 BBC News
12:30 World Business Report
12:45 Sport Today
13:00 BBC News
13:30 Top Gear (r)
14:00 BBC News
14:30 Asia Today
15:00 BBC News
15:30 HARDtalk (r)
16:00 BBC News
16:30 Europe Direct (r)
17:00 BBC News
17:15 World Business Report
17:30 Talking Movies (r)
18:00 BBC News
18:30 World Business Report
18:45 Sport Today
19:00 BBC News
19:30 HARDtalk (r)
20:00 BBC News
20:30 Click Online
21:00 BBC News
21:30 World Business Report
22:00 BBC News
22:30 Life
23:00 BBC News
23:30 World Business Report (r)
23:45 Asia Today

## TV3

05:00 Garfield Og Venner
05:25 Børnehjørnet
07:10 Tv-Shop
09:15 Popular
10:10 Popular
11:00 Horton-Sagaen
11:55 Horton-Sagaen
12:45 Ricki Lake
13:45 Giving Up The Ghost
15:30 Ricki Lake
16:25 Robinson Ekspeditionen - Det Endelige Opgør
18:00 Robinson: Bekendelsens Time
18:30 Tv3 Extra - Med Sportsnyt
19:00 Dawsons Creek
19:50 Den Eneste Ene
20:50 Sex And The City
21:30 Frid's Film
22:10 Line's
23:10 Tv3 Extra - Med Sportsnyt
23:40 Program Endnu Ikke Fastlagt
03:10 Seinfeld
03:40 Benny Hill
04:15 Godnat

## ÚF

07.00 Tíðindi
07.05 Morgunlestur - Ólavur Johannesen í Klaksvík lesur
07.15 Barnaløtan - Katrin og Kári stíla fyri
07.30 Tíðindi
07.35 Góðan morgun Føroyar
08.00 Tíðindi
08.03 Góðan morgun Føroyar
09.00 Tíðindi
09.03 Sjónarringurin (e) - Árni Joensen leggur til rættis
09.35 Dagsins tónar
09.50 Morgunlestur (e) - Ólavur Johannesen í Klaksvík lesur
10.00 Tíðindi
10.03 Fimleikaløtan 3
10.10 Tit skriva, vit spæla
11.00 Tíðindi
11.03 Á sanganna veingjum (e) - Gunnvør Poulsen stílar fyri
11.35 Undir døgurða
12.00 Veðurtíðindi
12.02 Middagstónleikur
12.17 Skráin og lýsingar
12.20 Tíðindini
12.40 Døgurðatónar
13.00 Tónatímin
14.00 Sostatt (e) - Elin Winther Poulsen og Bjørt Samuelsen leggja til rættis
15.00 Tíðindi
15.03 Nýtt og gott gamalt - Birgar Johannesen velur løgini
16.00 Tíðindi
16.03 Gospelløtan - Símun Jóannesarson Hansen stílar fyri
17.00 Tíðindi
17.05 Viðurgerði - Sending við reportasjum, samrøðum og frásagnum úr Suðuroy.
18.00 Barnaløtan (e) - Katrin og Kári stíla fyri
18.25 Skráin og lýsingar
18.30 Tíðindini
19.00 Skiftissiðir á lívsleiðini - 6. sending - Armgarð Arge leggur til rættis
19.30 Crescendo - Kári Olsen stílar fyri
20.30 David Copperfield - Elin Heinesen lesur 14. part av framhaldssøgu eftir Charles Dickens. Jens Pauli Heinesen týddi.
21.00 Tíðindi
21.05 Dagsetur
22.00 Ljóðmúrurin - Regin Egholm skipar fyri
23.00 Tíðindi

## Skiftissiðir á lívsleiðini

*- 6. sending*

ÚF Hóskvøldið kl. 19.00

Gestur í útvarpsstovuni er fólkalívsfrøðingur Jóan Pauli Joensen og hann fer at siga frá ymiskum brúdleypssiðum gjøgnum tíðirnar.

## Gesturin




Kim Simonsen. Vit hava lyndið til at tosa so nógv um tað serføroyska, at vit fáa ikki eygu á veikleikarnar í samfelagnum. Hetta heldur samfelagsviðmerkjarin Kim Simonsen. Og orsøkin er helst tann, at søgan er hertikin av søgufrøðingum, sum vilja lýsa tað tjóðskaparromantiska, heldur enn at lýsa søguna, sum hon veruliga hevur verið. Tí tykist føroyski samleikin so spjaddur, heldur Kim Simonsen, sum eftirlýsir eini nýggjari mentanarradikalismu. Bókin hjá honum "Kampen om den færøske fortid" kemur út á donskum forlagi næsta ár.
*Lagt til rættis: Ivan Niclasen.*

## Krimitímin: Eitt mál fyri Frost 1:2

*– bretsk krimi*

SVF Hóskvøldið kl. 21.45

Frost, kriminalassistentur, verður plágaður av einum dupultgangara, ið er ílatin sum Frost og á tann hátt sleppur hann inn til ungar kvinnur, sum hann so ger seg inn á. Hetta kann spilla umdømi hjá Frost og hann er í øðini, og ætlar sær ikki at lata búrhundin sleppa — hann skal fangast og setast handan rimarnar.
*Leikarar: David Jason, Bruce Alexander, Robert Glenister.*
*Leikrit: David Gilman.*
*Leikstjórn: Roger Bamford.*
*Fyrsti partur av tveimum – seinni partur kemur næsta hóskvøld.*

## Dawsons Creek (89)




Dawson og Jen uppdaga nýggj ting um hvønn annan, tá tey brúka vikuskiftið saman á einum filmfestivali í New Hampshire, og teirra vinarlag gerst til meira enn bara at vera vinir... Romantikkurin blómar eisini fyri Pacey og Karen í Boston.

## Rás 2

09:45 Orðið - Bíbliulestur v/ Anju Hansen.
10:00 Floksting (e) - Endursending frá í gjár. Hesaferð við Miðflokkinum. Sonne Smith leggur til rættis.
11:00 Tónleikur
12:00 Tíðindi
12:15 Tónleikur
13:00 Ynskiløtan - Heilsur frá lurtarum. Send heilsur um (www.ras2.fo) ella á fax. 359990.
14:00 Lýsingar
14:05 Ynskiløtan (framhald)
15:00 Tíðindi
1515 Leysaløtan - Innsløg, prát og tónleikur. Sonne Smith leggur til rættis.
16:00 Tónleikur
17:00 Norðlýsið - Aktuell sending úr Studio 7 í Klaksvík. John William og Oliver Joensen leggja til rættis.
18:00 Tíðindi
18:15 Tónleikur
19:00 Orð á leiðini (EvR) - Evni: Likamið: Samkoma Guds (1. partur av 3) Jógvan Zachariassen leggur til rættis.
19:40 Tónleikur
21:00 Tíðindi
21:15 Orðið (e) Endursending frá í morgun. Bíbliulestur v/ Anju Hansen.
21:30 Tónleikur
22:00 Girlzone - Undirhaldssending fyri ung, Súsanna Clementsen og Ruth Reinert skipa fyri. Telefon: 35 99 93 Fax: 35 99 90 E-mail: girlzone@ras2.fo
00:00 Liðugt

## Lindin

13.00 Byrjan - Dagsskráin verður lisin
13.05 Bankabók Trúarinnar - eftir C.H. Spurgeon
13.15 Sjólívið v/ Malmberg Olsen
15.00 Horizon Star v/ Stella Zachariassen
16.00 Sjómanssendingin Vitin v/ M.C. Restorff (e)
17.00 Tónleikur
18.00 Dagsins Orð eftir Svenning av lofti
18.05 Tónleikur
19.00 Brot og bitar ein ørvísi tíðindasending.
19.15 Tónleikur
20.00 Barnalindin (e)
20.55 Bankabók Trúarinnar - eftir C.H. Spurgeon (e)
21.00 Bønarlinjan, beinleiðis sending við gesti vertur er Jenis av Rana. Bønarevnir kunnu ringjast inn frá kl. 20.00. Tlf. 321377 og til ber at senda fax á nr. 321379. Heimasíða: www.lindin.fo
00.00 Dagsins orð eftir Svenning av Lofti (e)
00.05 Blandaður tónleikur, Dagsins Orð, o.a.
02.00 Ein forvitnislig ferð gjøgnum Bíbliuna (e) v/ Símun Absalonsen og Jógvan Zachariassen
03.00 Blandaður tónleikur, Dagsins Orð, o.a.
06.00 Vit gevast



# VIÐMERKINGAR

Heilaskaðar eru ymiskir 1:

# Tá fremsti parturin, pannulepin, verður skaddur

**Jón Ellendersen**



**(2. partur)**

Í fyrra parti lósu vit um Phineas Gage, sum fekk álvarsligan snudd í fremsta partin av heilanum, pannulepan og hvussu hann broyttist sum menniskja. Her fari eg at halda á fram við at siga frá einum øðrum manni, sum kann sigast at vera eitt klassiskt dømi. Eg havi valt at nevna hann Kenneth. Kenneth er mitt í 20unum.

Ein dagin Kenneth var og ferðaðist við gentu síni í VesturAsiu, gjørdist hann knappliga álvarsliga sjúkur. Fyrst helt gentan tað vera onkra smittu, men sum tíðin leið gjørdist tað greitt, at okkurt álvarsligt var áfatt. Kenneth misti gjørdist meiri og meiri fjarður, tosaði í ørviti, og at endanum misti hann vitið.

Skundisliga varð hann innlagdur, men á sjúkrahúsinum har á leiðini sóu teir beinanvegin, at teir kundu einki gera. Tískil varð Kenneth við sjúkraflogfari fluttur til meginlandið, har hann varð innlagdur á nevrologiska deild. Men støðan versnaði bara, og áðrenn døgnið var av, stóð øllum greitt, at Kenneth var farin í koma. Orsøkini funnu teir rættuliga skjótt. Kenneth hevði fingið ein sokallaðan herpes encephalitis, heilahinnubruna, sum skjótt spjaddi seg til fremsta partin av heilanum, pannulepan.



Œ sta in fyri ein minni ska a pannulepa
Kenneth ein sera lvarsligan ska a

Kenneth varð settur í viðgerð við antibiotiku, og so var farið undir at skipa fyri, at Kenneth skjótast gjørligt kundi venda heimaftur til Danmarkar, har hann búi, og verða lagdur inn á Ríkissjúkrahúsið har. Hetta tók tó nakrar vikur. Tá Kenneth at enda kom til Ríkissjúkrahúsið, var hann enn í koma. Læknarnir gjørdu av - av hvørjari orsøk veit eingin - at steðgja viðgerðini við antibiotiku. Hetta hevði tíanverri við sær, at brunin aftur fór at gera um seg og eftir stuttari tíð var skaðin fleirfaldaður. Í staðin fyri ein minni skaða í pannulepanum, fekk Kenneth ein sera álvarsligan skaða.

**Ein ógreið tíð**

Fyrstu nógvu vikurnar lá Kenneth bert og gløddi beint fram. Eisini aftaná, at hann so við og við kom út úr komaini. Úr dagbókini mamma Kenneth hevur skrivað kunnu vit lesa okkum til, at í veruleikanum høvdu læknarnir ikki hóming av hvat veruliga var hent við Kenneth. Hóast óteljandi skanningar, kanningar og samrøður við mammuna og gentuna hjá Kenneth, vistu læknarnir heldur ikki hvat teir í veruleikanum skuldu gera. Kenneth fær medisin, men hevur ikki sjálvur skil fyri at taka tað. Hann hevur heldur ikki skil fyri at hjálpa sær sjálvum, so hvønn morgun og fleiri ferðir gjøgnum dagin, er hann rennvátur og skitin, tó uttan at starvsfólkið ger annað enn at skifta honum. Hóast heilaskaðin er tað, sum setur stórsta dámin á lívið hjá Kenneth, so er tað júst hetta læknarnir konsentrera seg minst um; eisini aftaná at teir í veruleikanum sjálvir hava verið orsøk til, at skaðin versnaði munandi tá viðgerðin við antibiotiku var støðgað.

Tíðin gongur og aftaná at Kenneth hevur verið fluttur frá deild til deild til deild, verður hanns sendur heim, hetta hóast øll tekin greitt vísa, at Kenneth ongan møguleika hevur at klára seg sjálvan og at tað er ein alt alt ov stór uppgáva hjá gentuni at skulla taka sær av honum. Hon lesir frammanundan á universitetinum, arbeiðir hvørt kvøld og er ikki fleiri enn 22 ára gomul.

**Stýrdur av einum steinørum heila**

Trupulleikarnir hjá Kenneth eru serliga, at hann gloymir skjótt. Tað hann sá ella hoyrdi fyri einum minutti síðani, er burtur. Hann fær yvirhøvur ikki konsentrera seg og tað er týðiligt at hann knappliga livir í eini fullkomiliga fremmintari verð. Vanlig menniskju sum tú og eg kunnu sortera millum øll innskotini vit verða bumbaði við hvørt sekund, hvønn minutt og velja tað, vit fegin vilja samla okkum um. Hetta ger td. at vit kunnu fylgja við í undirvísing og ikki lata okkum órógva av øllum sum kemur innanífrá og uttanífrá. Men hjá Kenneth er alt ein stór fløkja. Øll innskotini, bæði tey sum koma innanífrá og tey sum koma uttanífrá koyra á hann alla tíðina eins og varð hann raktur av einari óhelmandi bumbing, dýktur undir av innskotum omaná innskot omaná innskot, og hann hevur ongan sum helst møguleika at velja hvat hann skal taka framum øll hini. Tað filtrið sum hjálpir okkum at sortera er hjá Kenneth oyðilagt av skaðanum.

Kenneth dugir heldur ikki longur at lurta eftir sínum egna kroppi, og tískil fer alt í buksurnar, ella í songina. Og hetta hendir líka mikið um hann er úti á vegnum, situr í einum bussi, situr við borðið ella liggur í songini. Ikki dugir hann longur at fullføra tað allarminstu uppgávuna. Alt gerst ov trupult og óyvirlítandi. Bert tað at vaska sær gerst knappliga truplari enn at fara til próvtøku í evnisfrøði ella matematikk. At vaska upp verður sum at skula gera ein ferð til mánan. Og tískil velir Kenneth at gera tað sum fyrst kemur honum í huga. Og við tað at tað sum kemur honum í huga skiftir við stuttum millumbili, er lítið og einki skil í degnum hjá Kenneth. Hann er vorðin ein trælur í egnum likami, stýrdur av einum heila sum er vorðin frá sær sjálvum.

**Ein stutt kanning**

Hyggja vit at yvirlitinum við teim 20 punktunum sum sermerkja ein skaða í pannulepanum, so síggja vit skjótt, at Kenneth er álvarsliga skaddur. Men til tess at eisini nýggjir lesarar kunnu fylgja við, so taka vit punktini einaferð enn, og hesa ferð við viðmerking um hvussu Kenneth er plaseraður í hesum sambandi.



Kenneth er vor in ein tr lur egnum l
st rdur av einum heila sum er vor in f
sj lvum

Kenneth + merkir, at hann hevur henda trupulleika
Kenneth - merkir, at hann ikki hevur henda trupulleika
Kenneth +? merkir, at hann hevur henda trupulleika í ein vissan mun

1. (hin skaddi) fær ikki afturhald, er hann fyrst farin í holt við at gera ella siga okkurt, sum einki skil er í ella sum lítil dugur er í (respons suppression problem) Kenneth +

*Frágreiðing: Hetta sæst best tá Kenneth skal ganga sær ein túr. Ístaðin fyri at venda aftur, so gongur og gongur og gongur hann tíma eftir tíma. Ofta villist hann og skal hava hjálp til at finna heim aftur.*

2. dugir illa at taka tær røttu ella tær "góðu" avgerðirnar (poor decission making) *Kenneth +*

*Frágreiðing: Ístaðin fyri at eta morgunmat og døgverða, etir Kenneth eitt ótal av Bounty sjokolátu. Onkran dag át hann ikki færri enn 40-50 Bounty.*

3. dugir illa at lesa, skylja ella virða kenslurnar hjá øðrum ella at halda seg til sosialu reglurnar hjá øðrum (no concern for others emotions and social rules) *Kenneth +*

*Frágreiðing: Kenneth spyr ein narkoman um veg til Tivoli. Men ístaðin fyri at fylgja honum til Tivoli, fer narkomanurin við Kenneth inn í eitt myrkt skot á einum byggjiplássi, har narkomanurin ætlar at sláa Kenneth niður og taka pening o.a. frá honum. Men Kenneth heldir alt væl til standa og heldir henda narkomanin vera ein stak fittan mann.*

4. dugir sera illa at hugsa abstrakt (at ímynda sær), at loysa trupulleikar ella at meta um tað, hann longu hevur gjørt *Kenneth +*

*Frágreiðing: Spyrt tú Kenneth hvat hann helst vil sleppa at gera svarar hann: Fara í Tivoli, tí hetta kennir hann best, ella minnist best.*

*Ella gevur tú honum 3 møguleikar, velir hann hin síðsta. Hann dugir ikki at ímynda sær eina hending, sum liggur frammi í tíðini.*

5. sigur ofta, at hann ætlar sær tað og tað ella at gera tað so og so, dugir væl at greiða frá síni ætlan og hvussu besti framgangshátturin er, men kemur síðani ikki úr stað (knowing-doing dissociation) *Kenneth +*

*Frágreiðing: ikki neyðug*

6. temporalir sekvenseringstrupulleikar, tvs. at hin skaddi hevur ilt við at seta hendingar í rætta tíðarraðfylgju *Kenneth +*

*Frágreiðing: ikki neyðug*

7. ringt innlit í egna funksjónsstøðu (funksjónsnivieau) *Kenneth +*

*Frágreiðing: Kenneth dugir ikki at síggja hvussu sjúkur ella skaddur hann er og dugir ikki at skilja, at hann ikki kann fara til arbeiðis ella at han ikki kann koyra bil.*

8. svingandi motivasjón, oftast motiveraður fyri tí, sum gevir positiva nøgd beinanvegin (ikki altíð gevur positiva feedback) *Kenneth +*

*Gert tú eina avtalu við Kenneth ella biðjir hann um hjálp, svarar hann fegin JA, men ger í staðin okkurt heilt annað. Antin velir hann at fara út at keypa Bounty ella at fara ein túr í Tivoli.*

9. trupulleikar at gera ætlanir *Kenneth +*

*Frágreiðing: ikki neyðug*

10. impulsivur *Kenneth +*

*Frágreiðing: Situr Kenneth t.d. og etur, reisir hann seg annan hvønn minutt tí hann kemur í tankar um nú eitt, nú eitt annað. Og viðhvørt so fýkur hann út gjøgnum hurðina uttan at siga frá.*

11. lættur at distrahera / fáa til annað enn tað, hann skal *Kenneth +*

*Frágreiðing: Gert tú eina avtalu við Kenneth ella biðjir hann um hjálp, svarar hann fegin JA, men ger í staðin okkurt heilt annað sum hann kemur í tankar um.*

12. stutt fjús /agressivur *Kenneth +*

*Frágreiðing: ikki neyðug*

13. euforiskur (offarakátur) *Kenneth +*

*Frágreiðing: ikki neyðug*

14. apatiskur *Kenneth +?*

*Frágreiðing: við jøvnum millumbili gerst Kenneth stillur, keddur og sitir bert og starir*

15. tómt kenslulív (overfladisk) *Kenneth +*

*Frágreiðing: hóast hann tosar um gentuna við stórum og vøkrum orðum, eisini tá hon er til staðar,, so ansar hann hana ikki tá hon er til staðar og hevur ongan hug at vera saman við henni.*

16. fabulerandi, tvs. at hin skaddi tosar uttan íhald, uttan at kunna skifta innihald (næstan frítt assosierandi, tvs. at hitt eina orðið tekur tað næsta, uttan sjálvskritikk og uttan tamarhald) *Kenneth +*

*Frágreiðing: ikki neyðug*

17. konfabulerandi, tvs. tosar um tað sum er ósætt ella heilaspuni (lýgir tó ikki beinleiðs, men ger tað til tess at skipa tað, sum ikki hongur rætt saman hjá tí skadda), hin skaddi manipulerar ikki, men hevur stórar trupulleikar í kontrolskipanunum hjá minninum tvs. at minnið ikki av sær sjálvum frásorterar eitt sokallað "falskt minnisspor" (gykl, kanska minnir sum veruliga stava frá eini bók, eini teknirøð, einum filmi ella tí, onnur hava sagt frá; hin skaddi heldur hetta vera minni frá egnum lívi) *Kenneth +*

*Frágreiðing: ikki neyðug*

18. hava lyndi til at vera perseverandi (ger tað sama umaftur og umaftur) í hugsan, talu og gerð (plátan melir í "somu rillu" uttan at hin skaddi dugir at skifta "rillu", plátan hakkar) *Kenneth +*

*Frágreiðing: ikki neyðug*

19. er rastleysur

*Frágreiðing: ikki neyðug*

20. hevur ikki tamarhald á seksuellum atburði ella seksuellari talu *Kenneth +*

*Frágreiðing: ikki neyðug*

– – –

Á sama hátt ber til hjá avvarandi ella teimum sum arbeiða við ein persóni, tey hava illgruna um kanska er raktur av einum skaða í pannulepanum. Henda 'kanning' má tó ikki setast í staðin fyri eina kanning hjá lækna og serlækna. Men hon kann geva eina rættiliga góða ábending um hvørt tað er ein pannulepaskaði talan er um, ella ikki.

**(framhald)**